# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Manglandi vilji og dirvi at halda aftur við íløgum

Ikki kann sigast annað enn, at nýggi maðurin í landsstýrinum, Magni Laksáfoss hevur megnað at fáa lív í politiska kjakið her á landi, nú tað í longri tíð hevur verið rættiliga kvirt á politiska pallinum. Tað sær ikki mætari út enn, at Tórbjørn Jacobsen hevur fingið ein fylgisneyta, ikki júst oratoriskt men meira ein, sum torir at siga tingini, sum tey eru ella soleiðis sum fólk flest uppfata tey.

Útmeldingarnar frá samgonuglimum eru rættiliga ørkymlandi. Magni Laksáfoss sigur seg einki skeivt hava gjørt. Hann heldur seg bert til avtalurnar í Tinganesi. Hann fær so eftir øllum at døma stuðul frá sínum egnu. Men javnaðar- og fólkafloksmenn eru sera ónøgdir við útspælini hjá Laksáfoss. Hesi komu fyrstu ferð fram í Sosialinum, har Laksáfoss fyri tíð síðani spældi eitt heldur eymt kort út, nevniliga, at best var at útseta Sandoyartunnilin. Fyri so í farnu viku í Sosialinum at skriva kronikk um m.a. skattaskipanina, sum aftur setti eld í.

Løgmaður fór skjótt upp í málið, tá Sandoyarkortið varð spælt út og fekk lagt ein dempara á. Nú bíða vit í spenningi at frætta, hvat sami løgmaður fer at gera við seinasta útspælið hjá Laksáfoss. Úttalilsini frá Fólkaflokkinum eru eisini eru eitt signal til løgmann um at "taka afferu". Spurningurin er bara, hvussu løgmaður kann tacla slíkt mál. Um hann ikki bara eigur at staðfesta, at valstríðið er byrjað og møguliga framskunda eitt komandi val.

Vit loyva okkum at ivast í, um tað fer at eydnast løgmanni at sissa ella flyta Laksáfoss. Hesin, sum er spildurnýggjur í føroyskum politikki, hevur brúk fyri at profilera seg og Sambandsflokkin, sum ikki hevur verið nóg markantur.

Tað kann eisini vera lagnunnar speisemi, at tað var Magni Laksáfoss og ikki Kaj Leo Johannesen, sum kom í landsstýrið. Onkur spyr, um løgmaður gjørdi nokk til tess at rudda slóð fyri Kaj Leo. Og at tað nú kemur honum aftur um brekku?

Ein spurningur, ið er verdur at tríva í eftir "Sandoyarsemjuna" í lítlu samgongu er hesin: Magni Laksáfoss gekk við til at sleppa "Sandoyarkortinum" og fekk ístaðin litið upp í hendi at køla búskapin av við at skerja raksturin á fíggjarlógini. Stutt eftir hesa semju fer Hans Pauli Strøm á tingsins røðarapall og sigur, at tað skal ikki skerjast ein króna á hansara øki. Heldur skulu fleiri pengar til. Hetta er øllum kunnugt størsti parturin av fíggjarlógini. Hetta hongur rætt og slætt ikki saman. Løgmaður hevur ein stóran trupulleika, ikki bara við Laksáfoss, men við sínum íløgupolitikki. Snýr hetta seg ikki, at samgongan ikki torir ella vil linka um íløgukrøvini frá ymsum valdømunum. Tað er kjarnin í málinum. Og tí eisini trupulleikin hjá løgmanni og samgongu. Raðfestið ørvísi eru ráðini frá SamVit stjóra í blaðnum í dag. Annars kann ganga heilt galið.

**Sosialurin**

## Fráfallin puristur

**JENS M. DALSGAARD**
jmd@kallnet.fo

André Niclasen hevur eftir øllum at døma einaferð verið puristur, tíbetur hálsaði hann um meðan tíð var og hevur gjørt okkum tann beina, at vísa okkum, at tað sum sigst at vera gott og rætt førist ikki er betur, kanska verri, enn tað sum sigst at vera vánaligt førist.

Førist er sjálvandi ikki bara førist, men tað er eisini eitt slag av religión fyri nøkur, málið skal tilbiðjast, verjast, hampast og ikki minst skulu nøkur orð lúkast burtur. Tá so onkur í meinigheitini missir trúnna er heilt galið, imamarnir fara straks á prædikastólin at viðgera mannin, ikki tað hann sigur.

Ein fráfallin puristur er sjálvandi ikki álítandi, álítandi fólk eru tey, sum eru fødd við eini meining og halda fast við hana alt lívið.

Tað at vit hava fingið orðaskifti um málið hevur nógv at siga og har hevur André gjørt so væl at leggja sakliga fyri. Hvat hann hevur verið fyrr og møguliga ætlar sær at blíva, hevur onki við sakina at gera.

Viðmerkingarnar frá Svenning Tausen hava onki við bókina hjá André at gera, men eru ósaklig og persónlig álop.

Tá eg gekk í skúla var málreinsingin komin væl ávegis, Svenning Tausen var ein so *nærlagdur* lærari, at eitt hent orð sum *blíva* fekk durafjórðingin frá honum longu í 1. real og tað gingu nógv ár áðrenn eg tordi at taka tað upp aftur. Tíbetur eri eg síðan aftur blivin ógvuliga væl við tad *nyttuga* orðið at blíva.

At ein maður sum André ger vart við at málreinsingin er farin yvir gevind er heilt uppá pláss, tí talan er ikki um verju av málinum, men at skapa málallergi.

Hinvegn er André ikki serliga víðgongdur, hann letur t.d. málsliga fremmandlikamið "ð" hava frið. Eddið er ein bókstavur, sum slett ikki hoyrir heima í føriskum, og føringar duga heldur ikki at brúka hann. Hetta er tjóvagóðs úr Íslandi.

**At vera ella ikki at verða**
Føringar hava droppað eddið fyri fleiri hundrað árum síðani og tí er eitt praktiskt orð sum *blíva*, blivið eitt neyðugt orð í føriskum. Í talumáli er ongin munur á vera og verða, var og varð og tað er helst orsøkin til at vit ikki vita nær vit skulu skriva vera við ella uttan ð.

Eg síggji at ein vanligur lýsingartekstur er: Søkt verður eftir ......Seinast eg sá tað frá einum almennum stovni var nú ein dagin, har løgmansstovan søkir eftir einum sendiritara til ambasaduna í Reykjavík, tekstin ljóðar: *Søkt verður eftir sendiritara til sendistovu Føroya í Reykjavík at seta 1. september*. Hvat merkir hetta? Søkja teir eftir sendiritara ella ætla teir at fara at søkja eftir sendiritara? Hvat man ein sendiritari vera fyri nakað?

Helst er hetta eitt prógv um at orðið "at verða" er óbrúkiligt uttan í einstøkum føstum vendingum. Vit føringar duga í hvussu so er ikki at brúka tað. Til dømis kunnu bløðini skriva at ein ella annar varð fríkendur í býrættinum, í nútíð: hann verður fríkendur. Hví skal man fara í rættin við einum persóni, sum verður fríkendur?

**Førisk ella íslendsk stavseting**
Á íslendskum eita oyggjarnar Færeyjar, hetta umseta vit uttan himpr til Føroyar, skal tað vera nøkur meining í at hava oyggjar uppí í Førjum, skuldi tað veri Føroyggjar. Tann vanliga úttalan er Førjar. Sama er galdandi fyri staðarnøvn sum Fugli(e), Svíni, Suðri. Í Kringvarpinum eru teir orðakringu kortini farnir at siga Fugloy og fugloyingur, Svínoy og svínoyingur osv., og ikki at forgloyma **fææær**telefon og **fææær**stød.

**Føriski halgidómurin**
Førist er *ikki* nakað heilagt og tí eiga vit at debatera okkara mál sum alt annað. Bókin hjá André er hvørki niðurbrótandi ella ein hóttan móti føriskum, men eitt kærkomið høvi at taka málið upp. Tað er ongin grund til at lýsa *fatwa* móti André, men kanska eru vit ikki komin longur enn talubanarnir.




Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.